Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðdis Hartmann Niclasen, løgtingskvinna

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Kostnaður av arbeiðs- og uppihaldsloyvum og familjusamanføring

Spurningar:

1. Hvørjar útreiðslur hevur tað almenna av at umsita skipanina við arbeiðs- og uppihaldsloyvum, undir hesum til starvsfólk, KT-skipanir og arbeiðið við afturferðarloyvum?
2. Hvørjar útreiðslur hava land og kommunur av familjusamanføring hjá útlendskari arbeiðsmegi, eitt nú til dagstovnar, skúlar, heilsuverk, integrátión og barnaverndartænastur?
3. Er nøkur samlað meting gjørd av netto-íkastinum fyri samfelagið, tá bæði inntøkur og útreiðslur verða roknaðar saman, og í so fall, hvat vísir tann metingin?

Viðmerkingar:
Víst verður mangan á, hvønn týdning útlendsk arbeiðsmegi hevur fyri føroyska búskapin og BTÚ, meðan minni verður kannað ella greitt frá um tær útreiðslur, sum fylgja við.
Vit vita, at drúgvar málsviðgerðartíðir hava víst, at Útlendingastovan hevur brúk fyri fleiri starvsfólkum og nýggjum KT-skipanum. Eisini hevur trupulleikin við uppihaldskortum longu kravt eyka arbeiðsorku og kostnað. Hetta merkir, at tað eru størri útreiðslur hjá almennu kassunum.
Harumframt hevur familjusamanføring við sær útreiðslur hjá bæði landi og kommunum í samband við integrátión á dagstovnum, skúlum og hjá heilsuverkinum, umframt at útreiðslurnar á barnaverndarøkinum eru hækkaðar munandi frá 2023 til 2024. Í Danmark vísa greiningar, at innflutt arbeiðsmegi gevur eitt positivt íkast, meðan familjusamanføringar, tíverri, draga niður.
Tí er tað týdningarmikið at fáa greiðu á, hvørjar útreiðslur Føroyar hava á hesum økinum, og um nøkur samlað búskaparlig meting er gjørd, tá bæði inntøkur og útreiðslur verða tiknar við.

Á Løgtingi, 29. august 2025

Eyðdis Hartmann Niclasen